# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Hjalmar Olsen Við Rætt, Toftir**, andaðist á Vesturskyn 16. mai, 79 ára gamal.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum fyri sýnda samkenslu, tá kæra móðir, vermóðir, omma og langomma okkara

**Signi Nielsen**

andaðist og varð jarðað.
Tøkk til starvsfólk og búfólk á Ellisheiminum, har henni unnaðist nøkur góð ár, nú móti endanum á lívsleiðini.
Tøkk til Bergur Debes Joensen, prest, fyri vøkur minningarorð.
Tøkk fyri blómur, kransar og gávur til Ellisheimið.
Tøkk til sangarar og tykkum, sum á annan hátt hjálptu til við jarðarferðina og fylgdu Signi til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Niels, Pia og Petur**

## Tøkk

Hjartans takk til tykkum mongu, sum mintust meg á 80 ára føðingardegnum.

Harrin signi tykkum øll.

**Malla Magnussen**

## Tøkk

Øllum tykkum mongu burtur og heima, ætt, vinir og kenningar og umboð frá almennum stovnum takki eg hjartaliga fyri, at tit vóru við til at gera 100 ára føðingardag mín 21. apríl so hugnaligan. Takk fyri talur, sang, gávur, blómur og heilsanir og signaða løtu í kirkjuni. Við Harrans signing til tykkum øll.

**Elsa Olsen, Argir**

**Dagurin**
**18. mai. Eirikur**, deyður umleið 1160. Svenski kongurin Eirikur IX Jeðvarðson, sum varð myrdur av danska prinsinum Magnusi og hansara monnum í Uppsala dómkirkju. Eirikur varð virdur sum svenskt tjóðhalgimenni alla miðøld. Navnið er norrønt og merkir hann sum ræður eina ella æviga.
*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*

# »Ongamannaland« í Smiðjuni

Hósdagin 21 mai, Kristi himmalferðardag, letur framsýningin "Ongamannaland" upp í Smiðjuni í Lítluvík. Talan er um eina framsýning, sum listafólkini Ásla Rannvá Svensson og Jóhan Martin Christiansen hava saman. Tey hava áður havt listaframsýningar saman.

Ásla Rannvá er í læru sum blómubindari í Akkuleya í Havn. Hon sigur, at blómur hava allar fagrar og glaðar litir, og tað speglast aftur í myndunum, sum hon hevur gjørt til hesa framsýningina.

Jóhan Martin Christiansen verður ikki sjálvur við til framsýningina í Smiðjuni, hann er staddur í Danmark, har hann tekur útbúgving innan list. Hann hevur gingið á listaháskúlanum í Holbæk og er nú á listaskúlanum á Ærø. Hann hevur arbeitt bæði við grafikki, málningum og instlatión, men til hesa framsýning hevur hann valt at hava málningar við. Jóhan Martin hevur fingið fýra myndir við til eina framsýning á Charlottenborg, sum er ein stór sensurerað framsýning.



Ásla Rannvá Svensson



Jóhan Martin Christiansen

Ásla Rannvá og Jóhan Martin, sum hava valt at kalla framsýningina „ Ongamannaland „, siga, at orðið møguliga fær fólk at hugsa um okkurt grátt og steinut, men tað nýtist tað als ikki at vera. Tað kann verða eitt land, tú ímyndar tær, ella kanska eitt dreymaland, har man droymir um nakað, sum er spennandi og áhugavert.

Ferniseringin verður hósdagin hósdagin kl 16-18.

Framsýningin verður opin soleiðis: Fríggjadagin kl. 15 -19, leygardagin kl. 14-19 og sunnudagin kl. 15-19.

*mg*

### Eysturoyar Røktar- og Ellisheim:

# Dansur og dansispøl í Runavík

Mikukvøldið 22. mai verður eitt mentanartiltak á Eysturoyar Røktar- og Ellisheimi við luttøku av dansifelagnum á Látrinum á Eiði.

Mentanartiltøkini á Eysturoyar Røktar- og Ellisheimi halda fram. Í samband við at 25 ár eru liðin, síðan heimið varð tikið í nýtslu, verður sum kunnugt skipað fyri fleiri ymiskum almennum mentanartiltøkum á heiminum. Komandi tiltak verður mikukvøldið 22. mai kl. 19.30 í kantinuni.

Dansifelagið á Látrinum á Eiði framførir dans og dansispøl, og Rasmus A. Joensen hugleiðir um føroyska dansin.

Mentanartiltakið mikudagin verður tað triðja av fleiri. Fyrsta tiltakið var týsdagin 24. mars, tá Kingobólkurin úr Tjørnuvík sang, og Martin Restorff Jacobsen, prestur, helt fyrilestur undir heitinum "Guðs rødd á mannatungu." Næsta tiltakið var 22. apríl, tá sangkreftir úr Fuglafirði sungu, og Zacharis Zachariasen, trúboðari, helt fyrilestur um lív og virki Victor Danielsens.



Aftaná mentanartiltakið mikukvøldið verður møguleiki at keypa sær ein kaffimunn. Tiltakið er alment, og øll eru vælkomin.



*Rasmus A. Joensen hugleiðir um føroyska dansin*